## Gamalt bræv til sølu

Eitt bræv, sum amerikanski forsetin Abraham Lincoln skrivaði einum drongi fyri næstan 150 árum síðani, skal nú seljast á uppboði. Søgan um brævið er, at í 1861 var tann átta ára gamli George Patten í Illinois við pápa sínum, sum var blaðmaður. Har hittu teir Abraham Lincoln. Heimafturkomin greiddi George skúlafeløgunum frá fundinum, men teir vildu ikki trúgva honum. Lærarin gjørdi tí av at skriva til forsetan fyri at fáa greiði á málinum. Bræv kom aftur frá Lincoln, sum váttaði, at hann hevði hitt George Patten í Illinois.



## Lufthansa slept SAS

Týska flogfelagið hevur nú slept ætlanini at keypa tað skandinaviska flogfelagið SAS. Tað váttaði ein av stjórunum, Christoph Franz, í samrøðu við Børsen í gjár. Týska felagið hevur keypt bretska flogfelagið British Midland og tað eysturríkska Austrian Airlines, og Christoph Franz sigur, at við hesum íløgum hevur felagið gjørt tær íløgur, sum tað er ført fyri at gera. SAS hevur havt stórt hall tað seinasta árið, og Christoph Franz sigur við Børsen, at Lufthansa kann ikki loysa allar trupulleikar í altjóða flogferðsluni.




*Landingarmiðstøðin Kongshavn hevur landað nógv meira fisk í ár enn í fjør, og serliga var tað byrjanin av árinum, sum royndist væl, eins og gulllaksaveiðan vignaðist rættiliga væl í ár*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

sum var nógv betri í ár enn í fjør, og tá komið var út á summarið, síggja vit, at juli mánaði í ár og í fjør góvu umleið tað sama.

*Djúpvatnstrolararnir Sjagaklettur og Steintór royna í løtuni eftir upsa í Norðsjónum, men enn er óvist, hvar skipini fara at leggja veiðina upp, tá túrur er lokin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Turt gólv hjá TG Seafood

**Mánadagin koma partrolararnir Hamranes og Breiðanes ætlandi inn at landa, og tá verður aftur fiskaarbeiði á fiskavirkinum í Hvalba**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hesa vikuna hevur verið turt gólv á virkinum hjá TG Seafood í Hvalba.

Eingin landing hevur verið síðan fríggjadagin, tá partrolararnir Hamranes og Breiðanes vóru inni við umleið 60.000 pundum.

Hetta var ein stuttur túrur hjá skipunum, sum brutu túrin av fyri at byrja nýggjan túr.

### Í Norðsjónum

Í Hvalba siga tey, at djúpvatnstrolararnir Sjagaklettur og Steintór í løtuni fiska upsa í Norðsjónum saman við øðrum føroyskum trolarum.

Nær Sjagaklettur og Steintór koma inn at landa, og hvar veiðan verður seld og løgd upp, tá túrur er lokin, veldst um, hvar skipini fáa besta prísin.

Mánadagin komandi verður aftur fiskaarbeiði á virkinum hjá TG Seafood í Hvalba, tá partrolararnir Breiðanes og Hamranes væntandi koma innaftur at landa.

Breiðanes og Hamranes hava havt stóran týdning fyri ráfiskatilgongdina til TG Seafood, síðan teir vórðu keyptir til Hvalbiar og fóru í vinnu.

Delta Seafood á Tvøroyri hevur arbeitt nakað av toski hesa vikuna, sum felagið hevur keypt á uppboðssølu.

# Rodmundur fregnast um leirvíkarvegin

**Sum skilst á Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, verður neyðugt at mýkja støðuna millum innlendismálaráðið og Eysturkommunu, um ætlaða vegagerðin í Leirvík skal kunna fremjast innanfyri íløgukarmin í verklagslógini**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rodmundur Nielsen, sum í hesum døgum er á løgtingi fyri Poul Michelsen, setti í gjár Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, ein munnligan fyrispurning um leirvíkarvegin.

Tað undrar løgtingsmannin, at arbeiði uppá vegagerðina ikki er sett í gongd enn, nú lisitatión um arbeiðstøku var longu tíðliga í summar.

Rodmundur Nielsen spurdi Anniku Olsen, nær landsstýriskvinnan væntar, at arbeiðið at gera vegin kann byrja – og um allar kringumstøður við ognarviðurskiftum og viðurskiftum við kommununa eru í lagi. Hann spurdi eisini, um landsstýriskvinnan er nøgd við tey tilboð, sum komu inn upp á arbeiði.

Annika Olsen svaraði, at landsstýrið er kunnað um, at roknast kann við endurgjaldskrøvum frá kommununi, um kommunan ikki fær endurgjald fyri eitt nú bátahyl, parkeringsøki og frákoyringar í sambandi við ætlaðu linjuføringina og vegagerðina.

### At mýkja

Landsstýriskvinnan helt annars, at tey tilboð, sum komu inn upp á vegagerðina, eru nøktandi og segði, at innlendismálaráðið nú fer at royna at mýkja støðuna millum landsmyndugleikar og kommunu, soleiðis at ætlaða vegagerðin á ein ella annan hátt kann fremjast innanfyri karmin í verandi verklagslóg.

Hon segði eisini, at undirtøka er ikki í samgonguni fyri at økja um karmin í verklagslógini, sum er 40 miljónir krónur.

Rodmundur Nielsen sigur við Sosialin, at einar 20 miljónir krónur eru settar av til hetta arbeiði í ár, og tí er tað ørkymlandi, at arbeiði upp á leirvíkarvegin enn ikki er farið í gongd.




*Hóast 20 miljónir krónur eru settar av til vegagerð í Leirvík í ár, er arbeiðið framvegis ikki farið í gongd. Hetta fekk løgtingsmannin, Rodmund Nielsen, at spyrja landsstýriskvinnuna, Anniku Olsen, um, hvat status í málinum er*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*